# Íslendskur ørindadrongur skeiklar og beklar søgulig fakta

VIRGAR T. DALSGAARD
14. mars 2007



**Privatiseraður uttanríkispolitikkur**

*Fyrrverandi* íslendskur *(general)*konsul, *fyrrverandi* lokalpatriotiskur skipasmiðjueigari, *núverandi* nationalur privatiseringspionerur og multinationalur avreiðari av føroyskum vinnulívi; harumframt globalur oljumatadorur *in spe*, tann hendinga beskedni plutokraturin harra Poul Mohr er nú eisini farin at royna seg sum filosoffur, flaggpartisanur og metafysiskur søgumaður.

Í okkara privatiseringstíðum er lagamanni at fáa hvønn tvangstanka út til fjøldina, ikki minst tá ið ein ovurfúsur og stak-servilur *almentløntur* sjónvarpsdrongur býður *almenna* senditíð og rættir fram *almenna* licensfinansieraða mikrofon til ekstremt privatan monolog

Nógv umrødda sjónvarpsløtan við Pouli Mohr var *so* intenst privatiserað, at eingin annar slapp framat, heldur ikki løgmaður, sum annars persónliga bleiv illa viðfarin og beinleiðis desavoueraður av íslendska eks-konslinum.

Í tí glashúsinum, sum konsul Mohr stóð í, var ikki júst hóskandi at fara og steina, hvørki eftir Danmark ella løgmanni; men inhabilitetur er jú næstan ein dygd í Føroyum. Tað er ótrúliga ússaligur journalistikkur, har bara annar parturin sleppur at "filosofera" um politikk ella onnur kontroversiell mál. Tað er einki minni enn kúging av grundlógar-tryggjaðum talufrælsi.

**Láturligur miðlastormur**

Flaggmálið hjá føroyskum sendidreingjum í Reykjavík var longu av øðrum fantastum gjørt til eina fatala *orkan í einum vaskifati*. Og Poul konsul legðist ikki á boðini. Hann lýsti tað nærmast sum eina tragediu, at ein grótføroyskur sendiskrivari skuldi noyðast at sita við eitt óføroyskt skrivi- og knappaborð í rótføroyskari knappatroyggju og kúla seg saman í ríkisdonskum høli undir donskum flaggi.

Slík idiosynkrasi kann virka hysterisk og púra irrationel fyri vanligt fólk, men fyri ein erkvisnan loysingarmann, sum er uppaldur til allergi yvirfyri Dannebrog, er hetta ikki primitiv provokatión, men náttúrligt "revolvara-diplomati".

Konsulin slapp eisini uttan andstøðu at revidera og privatisera søguna eftir egnum tykki. Hann fortaldi t.d., at Anders Fogh plagdi at klamsa hurðina í nøsina á løgmanni, tá ið hann kom til Danmarkar. Bæði konsulin og mikrofondrongurin vita, at hetta er aldri fyrikomið! **Hetta** er loddrøtt lygn.

Hevði tað hent, so vita vit væl, at f**øroysk fjølmiðlafólk høvdu níst og skríggjað verri enn orientalskar grátikonur í vikuvís.** Danskarar duga diplomatiskan sið, tað ger konsulin ikki.

Sum lýðin íslendskur ørindadrongur belærdi Mohr føroysku hyggjararnar um, hví teir skullu fegnast um at verða trælkaðir og nýkoloniseraðir av íslendingum. Tað er ikki eyðmýkjandi at liggja undir íslendskum jarnhæli, tí teir hava "virðing" fyri okkum! Andin í monologinum var tann, at vit skullu læra at elska íslendska trældómin og góðtaka rolluna sum fíggjarlig offurlomb.

Og so visti konsulin eisini at siga, at føroyingar ongantíð høvdu brúkt donsku ambassaduna í Íslandi – teir vóru altíð farnir beinleiðis til íslendingar, t.e. uttan um ta donsku ambassaduna.

Hetta er krunkandi svørt lygn. Tað er ikki vist, at konsulin lýgur, tí hann kann jú vera óvanliga stuttmintur. Men tað er óhugsandi, at ein maður, sum er síðst í hálvfjerðsunum ikki skal hava hoyrt um ta óføru donsku frúnna *Bodil Begtrup,* fyrsta danska kvinnuliga ambassadørin, sum m.a. gjørdi eitt risaarbeiði fyri nógvar føroyingar í Íslandi tíðliga í hálvtrýssunum.

**Ósolidariskir íslendingar**

Men eftirsum konsulin er so stuttmintur, so skal eg lata hann vita, at viðurskiftini millum føroyingar og íslendingar als ikki vóru "virðilig", hvørki í 50´unum ella 60´unum. Tvørturímóti – tað vóru ofta fortvivlaði viðurskifti fyri nógvar fiskimenn, útróðrarmenn og serliga arbeiðsgentur. Løn-úrtøkan var aloftast verri, arbeiðstíðin longri og arbeiðsvilkorini ónossligari enn tað, sum varð avtalað frammanundan, og tað var eitt tógvið stríð hjá smáfólki at bøta um tey *óvirðiligu* korini ella at fáa pengarnar, man hevði til góðar. Tað var, mjúkt sagt, lítil hjálp at fáa frá tí føroyska fiskimannafelagnum – teir vóru næstan eiðasørir! - Men tað er ein heilt onnur søga.

Íslendska krónan var valutariskt sera óálítandi, og íslendskir arbeiðsgevarar hveptu seg ofta við at halda sáttmálar ella kompensera fólki fyri krónufall, og tí máttu føroyingar ofta fáa hjálp frá donsku ambassaduni, og tað syrgdi tann dynamiski økonomurin *Bodil Begtrup* fyri, at teir fingu. Hon var bæði tolin og treisk, og íslendskir myndugleikar høvdu *respekt* fyri henni..

Tessvegna eru nógv *enn* á lívi, bæði kvinnur og menn, sum minnast hesa merkiskvinnu við takksemi. Hon var internationalt kendur feministur og hevði arbeitt í ST við kvinnumálum.Hon var tí serliga upptikin av vilkorum hjá kvinnum á arbeiðsmarknaðinum. Hetta kom bæði føroyskum og íslendskum arbeiðsgentum væl við. Var nakað mansevni í konslinum hevði hann ***post mortem*** givið BB eina treytaleysa umbering fyri, at hann var so dølskur og minnisveikur, at hann *gloymdi* hana!

Eftirmaður hennara, juristurin, *Eggert Knuth* hjálpti m.a. Føroya landsstýri nógv í sambandi við tær strævnu samráðingar, sum vóru vegna útflytingina av sjómarkinum í 1958. Bæði *Kristian Djurhuus* og *Petur Mohr Dam* høvdu nógv gott at bera tí manninum. Og tað var avgjørt neyðugt við praktiskari danskari hjálp, tí *tá* sýndu íslendingar óhugnaliga lítla virðing fyri tí lítla føroyska fólkinum, sum átti at fingið søguligan hevdsrætt innan fyri íslendskt sjómark, har teir høvdu fiskað í meira enn 80 ár. Tað løgdu íslendingar einki petti í, - teir førdu seg fram sum karráir imperialistar.

Petur Mohr Dam segði fleiri ferðir, at hann hevði ongantíð havt brutalari og arrogantari samráðingarmótpart enn Ísland í 1958 – tað stendur søguliga rimmarfast. Tá var als einki brøðralyndi at hóma!

**Mytan hjá konslinum er følsk**

Nær og hví menn eru farnir at dyrka mytuna um íslendingar sum okkara vinmenn, er eitt sindur ógreitt, men tað er avgjørt ein myta, sum ikki eigur søguligan basis. Vit hava, sum Andrass Samuelsen, sáli segði, altíð verið konkurrentar! Og tað er, sum flestum kunnugt, lívsfarligt at fraternisera við konkurrentarnar. Tey, sum royna at skøva útyvir hetta, eru ikki annað enn undirbrotlig og søgufalsandi íslendsk sambandsfólk.

Tann nationala ekstasan um eina flaggstong í Reykjavík, sum hevur formyrkað okkara íslendsku sambandsmenn, er púra analog við tað paranoia, sum okkara norsku sambandsmenn við Pálli Patursson á odda vóru andiliga myrkalagdir av fyrst í tretivuárunum.

Meðan ***Diplomat-Poul*** ræður til *sjálvtekt*, við at *heysa* føroyskt flagg, har tað *ikki* skal vera, bara fyri at provokera danskarar, so *skar hálvbónda-**Páll*** danska flaggið niður, har tað *átti* at vera (eftir tágaldandi reglum), eisini fyri at provokera danskarar. Man má siga, at tað er eitt andiliga fátækt fólk, sum dyrkar slíkar primitivar herverksmenn sum hetjur. Juridiskt eru slíkir menn lítið mætari enn vulgerir bandalimir í einum rockara-klubba.

Dagsskráin hjá hesum monnum er ógvuliga týðulig. Glorificering og paradisiskar anekdotur um Ísland ella Norra, og so sáa alskyns mistreysti og lygisøgur um Danmark. Málið er permanent konfrontatión og provokatión móti øllum donskum.

Tí tað eru jú stórt sæð tær somu typurnar, sum runnu **skitin** ørindi fyri norðmenn í tretivunum, ið nú renna kolonialistisk og imperialistisk avreiðingarørindi fyri íslendingar. Bæði *sjálvtekt og áheitan um sjálvtekt* er ólóglig, men stóð tað til skipasmiðjufilosoffin, so verður jura privatiserað eftir plutokratiskum princippum.

Franskmenn siga ógvuliga rámandi um sjálvtekt, at tað er ***se faire justice à soi-même*** og so kann tað valla vera meira privatiserandi *egocentriskt, sjálvsøkið og nalvaskoðandi*.

**Postludium í bløðunum**

Rolf Guttesen, sum *komandi* oljumagnaturin pointerar, er *fyrrverandi* lektorur, ávísti bein-leiðis skeivleikar í tí, sum konsulin segði, og Rolf fregnaðist ógvuliga prægnant eftir konkretum svørum upp á órímulig úttalilsir frá konslinum, men einki av hesum er plutokraturin førur fyri at svara uppá ella reka aftur. Í staðin fyri trívur hann desperatur í síni argumentneyð eftir sjúrðarkvæðunum fyri at leita sær ein ugga úr miðøldini.

Tað er ógvuliga symptomatiskt fyri eina so primitiva anakronismu sum loysingarrørsluna, at hon noyðist at leita sær styrki og sítt analoga tankatilfar í oldgermanskum problematikki niðri við *Rhinen í burgundara-býnum Worms* fyri 1500 árum síðani, har *Siegfried, Günther og Hagen* herjaðu og bardust. Men tá í tíðini var jú lítil debatt og enn minni jura – tað var mest svørðið og nevarætturin, sum avgjørdi "diplomatiskar" ósemjur.

Tað er helst ikki av tilvild, at oljukonsulin er so hugtikin av einum ógvisligum ørindi í Høgnatátti. Sum citatið hjá konslinum sigur: *"Tá høgdi man trælir niður"* og so slappst jú undan allari lønartrætu. - Sum politikkur og diplomati var vælsignað einfalt tá..

Endiliga gevur Søgu-Poul Rolfi eitt skemdarspark fyri at hava verið kommunistur, stalinistur v.m., inntil Berlinmúrurin datt. Gaman í, men tað vóru tað grúiliga nógvir, sum vóru.! Ikki minst teir, sum nú ferðast dúgliga á bonaðu gólvunum hjá Pouli.

**Ónosslig symbiosa millum kapitalist og stalinist**

Men hvussu er vorðið við konslinum og stalinistisku kommunismuni? Ja, so paradoksalt tað ljóðar, so gjørdi konsul Poul ikki vandari enn, at hann forlovaði seg kommercielt við tí mest *rabiata* maoistiska stalinistinum á kinesaravonginum í Framanum, harra Kjartani Hoydali.

Henda sjáldsama registreraða oljugreipa hevur síðani dominerað føroyskan orkupolitikk og prostituerað seg undir tí illkendu og ónossligu multinationalu oljufyritøkuni *Amerada Hess*. Henda fyritøka er internationalt kend fyri at trælka og kúga fakfeløg og brúka smábørn sum trælir í oljuvinnuni, serliga í Birma og Nigeria. Jú, hetta eru knáir menn, heilt eftir miðaldarleisti í sjúrðarkvæðunum.

Føroyskur oljupolitikkur er forkrypplaður síðani hesa ódelikatu greipu, tí tað almenna er skúgvað til viks og púra einki hevur fingið at siga. Alt er privatiserað av tí framamanninum, sum var størsti hatari av øllum *privatum* fyritaksemi, inntil hann fylti hálvthundrað og møtti Pouli.. Nú er konsulin ógvuliga góður við stalinistin og hjúklar um hann.

Annars var harra Hoydal munandi meira at síggja í DDR handan Berlinmúrin, enn Rolf nakrantíð var. Og líkasum Poul trívist í Reykjavík, so stórtreivst Kjartan í lívdav Berlinmúrinum, sjálvt um hann seinni mest ferðaðist til summarlegur í Albanien hjá stalinistiska bølmenninum Enhver Hodja.

Hevur stalinistiski ekskommunisturin, sum nú snorkar í London, púra einki vald á Pouli ekskonsli, ja, so er hann bara skammleysur opportunistur ella trælur.

Og *trælir*, citerar Poul úr Høgnatátti *skullu høggast niður*. Júmen, plutokrati er helst nógv meira konsekvent, kliniskt og ómakaleyst enn eitt stríggið demokrati.

Illur???

Sig tína meining í Sosialinum

